# osk í Suðuroy



*– Norðmenn arbeiða hart fyri at menna toskaalingina og tá ið teir fáa sent fyrstafloks aldan tosk á marknaðinum í Evropa, stúri eg fyri, at flakavinnan í Føroyum fer at tapa kappingina, segði Hørður Wardum á evnisdegi um menningarmøguleikar í Suðuroy*

at menna toskaalingina og hann stúrdi fyri, at tað fer at vera torført hjá føroysku flakavinnuni, tá ið norðmenn rættiliga hava fingið gongd á sína toskaaling.

– Tá ið norðmenn fáa sent fyrstafloks aldan tosk á marknaðinum í Evropa, tíma fyri tíma, um so skuldi verið, stúri eg fyri, at flakavinnan í Føroyum kemur at standa sum tapari í kappingini, tí tá kunnu vit ikki hava nóg støðuga levering og nóg støðuga dygd til at vit kunnu kappast við alda toskin, segði Hørður Wardum.

## Gjørd ætlan fyri at byrja skjótt

Á evnisdegnum var eisini bólkaarbeiði, og bólkurin, sum hevði við toskaaling at gera, legði fram eina ætlan fyri, hvussu toskaaling kann mennast í Suðuroy.

– Sostatt fer alivirkið Faroe Farming í Suðuroy beinanvegin at biðja Vinnumálaráðið og Fiskirannsóknarstovuna um loyvi til at taka yngul av Føroya Banka til endamálið.

Hørður Wardum væntar, at í fyrstu atløgu kann takast eitt lítið tal av yngli fyri at fáa meiri vitan og fyri at fáa gongd á toskaaling og fyri at kunna ala lívfisk.

– Næsta stigið verður at hugsa um eina lívfiska- og yngulstøð. Í løtuni hevur Fiskaaling eina lívfiskastøð til kalva í Nesvík í Sundalagnum.

Men skulu størri íløgur gerast í eina lívfiskastøð til tosk, metir Hørður Wardum ikki, at tað er skilagott at hetta eisini verður gjørt í Nesvík.

– Støðin í Nesvík er vælegnað til royndarvirksemi, men ikki til aling á vinnuligum støði. Hetta tí, at í Sundalagnum verður altíð rættiliga nógv aling, og tá minkar trygdin móti sjúkum samsvarandi.

Sjálvur heldur Hørður Wardum, at ein lívfiskastøð liggur nógv betri fyri í Suðuroy, har sjúkutrygdin kann verða betri. Tí kunnu møguligar almennar íløgur á hesum øki heldur gerast í Suðuroynni enn í Sundalagnum.

– Men Fiskaaling hevur vitan um toskaaling, og tí eigur hetta arbeiði at verða gjørt í tøttum samstarvi við Fiskaaling og annars við útlendingar, ið hava gjørt sær royndir í at ala tosk í størri skala.

Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at fáa loyvi at taka lívfisk av Føroya Banka. Í samband við hetta skal fundur fáast í lag við Vinnumálaráðið og Fiskirannsóknarstovuna. Fæst lívfiskur í ár, gýtur hesin næsta vár og yngulið undan honum kann so setast á sjógv á heysti 2006.

Hørður Wardum metir, at tað verður bara hendan eina lívfiskastøðin til tosk, tí við at hava eina stóra støð, ber til at fáa eindarkostnaðin niður, annars fæst ikki lønsemi í toskaalingina.

## Skulu tosa aftur

Erhard Joensen, stjóri á Faroe Farming, sigur, at teir hava havt samband við Fiskirannsóknarstovuna. Enn er onki avgjørt, men tey hava avtalað at tosa saman aftur.

Sjálvur metir hann avgjørt, at toskaaling kann verða eitt alternativ til laksaaling.

– Hetta er í hvussu so er eitt øki, har vit hava ein beinleiðis kappingarfyrimun við tað, at bankatoskurin veksur eini 30% skjótari enn annar toskur, sigur hann.



*Tey hoyrdu alifrøðing siga, at tað eru nógvir fyrimunir við at ala tosk í Føroyum, heldur enn laks. Ein*

**Stongt**

Vit eru flutt í fyribilshølir beint niðan av Føroya Tele
og hava tí stongt 6. og 7. juni.

**Opið**

Mikudagin **8. juni** er opið aftur í fyribilshølum beint niðan av Føroya Tele.

**Nýtt høli**

Hósdagin **7. juli kl. 13.00** lata vit hurðarnar upp í okkara
nýggju hølum 200 m. norðanfyri verandi høli.



Sunnudagin 5. juni 2005 lótu vit hurðarnar aftur fyri seinastu ferð í núverandi hølum. Tíverri megnaðu vit ikki at hava okkara nýgga høli liðugt, men verður latið upp í nýggjum hølum 7. juli. Í hesum tíðarskeiði verður opið við skerdum úrvali í gomlu kioskini hjá Elisabeth (beint niðan av Føroya Tele).

Vit takka tykkum mongu, sum hava vitja okkum øll hesi árini og gleða okkum at bjóða tykkum vælkomin í okkara spildurnýggja handil **7. juli kl. 13.00.**

KLAKSVÍK vár SALTANGARÁ

Saltangará Tel. 448392

VASTI 450010